# Arvurin eftir Marti

**Nú eru liðin 40 ár, síðani Martin Luther King varð myrdur. Hann hevur nú verið deyður í longri tíð, enn hann var á lívi. Men lekir tíðin øll sár, og hvør er arvurin eftir Luther King?**



## Martin Luther King



Vivian Begerau

Árið 1968 var eitt hendingaríkt ár. Kring allan heim gjørdu lesandi uppreistur. Vietnamkríggið leikaði harðliga á. Handan Jarntjaldið var enn eitt land bankað upp á pláss, tá russisk tanks rullaðu inn í Prag, og nýhugsanin varð køvd. Apollo 8 startar á fyrsta sinni longu ferðina upp á mánan, tó var mánalendingin ikki fyrr enn í 1969. Hetta var eisini árið, tá Robert Kennedy varð skotin, ikki bert hann, men eisini heimskendi mótstøðustríðsmaðurin Martin Luther King lat lív í apríl mánaða 1968.

Tann 3. apríl 1968 helt Martin Luther King seinastu røðu sína. Hendan røðan, ið var hildin í „Bishop Charles Manson Temple" í Memphis, Tennessee, fyri 11.000 áhoyrarum, var á ein hátt profetisk. Hann nevndi, at eitt langt lív ikki var hansara mál, hansara uppgáva var at gera Guds vilja. Gud hevði ført hann niðan á fjallið, har hann hevði sæð tað lovaða landið, ið fólk hansara fór at koma inní. Síðst í røðuni segði hann seg ikki óttast menniskju, tí hann hevði sæð Guds heiður. Einans eitt samdøgur aftaná gingu tíðindini um allan heim, at Martin Luther King var myrdur.

Ramman um uppvøksturin hjá King var suðurstaturin Atlanta, Georgia, ið liggur á eystursíðuni á USA. Barndómsheimið hjá Kings lá á „Auburn Avenue", flestu íbúgvarnir í tí gøtuni vóru vælhavandi svørt, eins og King-húskið. Martin Luther King var sonur lærarinduna Albertu Christine Williams King og baptistaprædikumannin Martin Luther King (Senior). Tó lá eitt myrkt skýggj yvir miðalklassabarndóm hansara. King vaks upp í einum samfelag, har svørt og hvít livdu heilt sundurskild ígjøgunum sokallaðu „segregatiónina". Børnini gingu í ymsum skúlum, tey gingu í ymsum kirkjum, tey hvítu sótu á teimum bestu plássunum í almennum bussum og tokum, alt samfelagið var býtt upp í svart og hvítt, har tey svørtu vóru fyri einum mismuni vegna húðalit sín. 18. Juni 1953 giftist Martin Luther King (junior) við Corettu Scott Williams. Saman fingu tey børnini Yolandu Denise, Martin Luther III, Dexter Scott og Bernice Albertinu.

### Startskotið til mótstøðurørsluna

Í desember 1955 varð svarta seymikonan „Rosa Parks" handtikin, tí hon ikki vildi reisa seg upp fyri einum hvítum manni, ið koyrdi við sama bussi sum hon. Hon noktaði at reisa seg upp, tí hon sat á einum plássi, ið var til tey svørtu. Hetta var í roynd og veru startskotið til mótstøðurørsluna, ið Martin Luther King bleiv oddamaður fyri. Hendingin útloysti eina solidaritetsrørslu ímillum tey svørtu, tí ein triðingur av íbúgvunum í Montgomery var svartur. Hesi stóðu saman um at boykotta bussfelagið í býnum; hetta bleiv kent sum „Montgomery Bus Boycott". Búskaparliga sæð hevði bussfelagið stóran vinning av svørtu kundunum; tó høvdu hesi eingi rættindi. Boykottið helt á í meir enn eitt ár. Tann 26-ára gamli King var valdur til leiðara fyri nevndina „Montgomery Improvement Association". Boykottið endaði við, at ein hægstirættur gav forboð ímóti rasuskilnaðinum í bussum í býnum. Tey komandi árini aftan á henda sigurin ferðaðist King túsundavís av kilometrum kring USA og eggjaði fólki til at gera nakað fyri borgararættindini hjá teimum svørtu.

### Reformatorur fyri rættindunum hjá teimum svørtu

Martin Luther King er uppkallaður eftir stóra týska reformatorinum úr Wittenberg - Martin Luther. Eins og Luther peikaði á skeivleikar í 16. øld og reformeraði trúðarlívið, peikaði King á rasumismnir, ið var ein skeivleiki í 20. øld.

Tey 13 árini frá 1955 til 1968 varð King tikin í varðhaldi umleið 30 ferðir og svav mangar nætur í fangahúsi. Í 1956 varð hann kosin til ársins mann í vikublaðnum „Time". Á sumri 1963 vóru 841 mótmælisgongur í 196 ymsum býum fyri rættindunum hjá afroamerikansku borgarunum. Søguliga talan, ið er kend enn í dag: „I have a dream" varð hildin bert fáar mánaðar undan morðinum á J.F. Kennedy forseta, undir sokallaða „March on Washington for Jobs and Freedom", har 250.000 vóru við í demonstratiónini, harav 60.000 hvít.

Í 1964 fekk tann einans 35-ára gamli King Friðarnobelprísin. Í kirkjuni í Riverside í New York segði hann sína meining ímóti krígnum í Vietnam í 1967. King var vorðin ein persónur ið sera nógv lurtaðu eftir; tí fekk hann eisini nógvar fíggindar, tá hann kritiseraði Vietnamkríggið. Deyði hansara, ella hansara martýrium, bleiv til endans sterkasta og harðasta røddin hjá teimum svørtu. Stóra fyrimyndin hjá King var Gandhi. Við sanginum We shall overcome stríddist King fyri sakini uttan harðskap. Hann er enn í dag eitt ikon í friðarligu mótstøðurørsluni og í stríðnum ímóti rasumismuni.

### Tikin av døgum á einum lukkuligum degi

Á kvøldi tann 4. Apríl í 1968, klokkan 18:01, varð King skotin á altanini á „Lorraine Motel" í Memphis, Tennessee. Hóast fólk komu til hjálpar alt fyri eitt, doyði hann 20 minuttir seinni. Í einum rúmi í bygninginum beint yvirav varð skotvápnið funnið. Fingramerkini á vápninum førdu løgregluna til mannin James Earl Ray, ið hevði verið revsaður fleiri ferðir áður. Hann varð handtikin í London nakrar vikur seinni. Hann varð dømdur til 99-ára fongsulsrevsing, og doyði hann í einum fangahúsi fyri nøkrum árum síðani. Kona king, Loretta, trúði ikki upp á, at Ray var drápsmaðurin. Hon og mong onnur halda, at hann var offur fyri eini samansvørjing, ið høgir menn í eitt nú FBI stóðu aftanfyri.

Jarðarferðin hjá King varð hildin 9. Apríl í 1968. Hann varð jarð-